Ferðavinnufelagið

Til
Trivnaðarnevnd Løgtingsins
oluvad@logting.fo

Tórshavn 25. september 2026

Viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um stuttíðarleigu av bústøðum

Ferðavinnufelagið hevur tíverri ikki møguleika fyri at luttaka á fundi við Trivnaðarnevnd Løgtingsins í sambandi við nevndarviðgerð av LM-005/2026 – Uppskot til løgtingslóg um stutttíðarleigu av bústøðum, og sendir tí hervið viðmerkingar felagsins til uppskotið.

Yvirskipað tekur Ferðavinnufelagið undir við uppskotinum. Felagið fegnast um, at stutttíðarleiga verður sett á breddan. Tað er skilagott, at reglur verða settar, so karmarnir fyri stutttíðarleigu verða skipaðir.

Felagið hevur limir kring alt landið, sum reka gistingarvirksemi, og felagið hevur áður víst á, at stutttíðarleiga í dag er ein óskipaður marknaður, sum eigur at virka undir somu treytum sum gistingarhús.

Uppskotið skipar ikki karmar fyri javnari kapping
Í viðmerkingunum til orsøkir til uppskotið stendur m.a. skrivað, at:

"*Stutttíðarleiga virkar hartil í støðum lið um lið við gistingarhúsvinnuna, men eftir munandi øðrvísi krøvum, og tí er eisini viðkomandi at meta um, hvørt kappingin er jøvn millum tey, sum veita gisting til ferðafólk.*
Tørvur er á at skipa karmar um hetta virksemi."

Hesum tekur Ferðavinnufelagið undir við, men felagið metir ikki, at lógaruppskotið í verandi líki er nóg mikið til at tryggja javnari kapping millum gistingarhús og stutttíðarleigu. Felagið heldur, at ein skrásetingarskipan eigur at vera ein grundleggjandi partur av lóggávuni, um endamálið um javnari kapping skal røkkast í praksis. Tað eigur í minsta lagi at verða sett krav um, at bústaðir, sum ætlanin er at leiga út til stutttíðarleigu, skulu skrásetast í eina skipan.

Krav um skráseting
Tað eigur at vera krav um at skráseta bústaðir, sum ætlanin er at nýta til stuttíðarleigu. Tvs. at allir bústaðir sum verða leigaðir út til stutttíðarleigu skulu skrásetast í eina felagsskrá, uttan mun til um kommunan ásetir reglur fyri stutttíðarleigu ella ikki.

Hetta kann gerast í eini online-skipan, og krav eigur at vera, at skrásetingarnummarið skal upplýsast, tá ið stuttíðarleiga verður boðin fram.

Endamálið er, at tað almenna lættari kann hava yvirlit yvir marknaðin fyri stuttíðarleigu - serliga fyri at tryggja, at rættur skattur og røtt avgjøld verða goldin, so tað ikki virkar kappingaravlagandi.
Á henda hátt verður eisini tryggjað, at øll gistingarhús hava somu treytir, tá ið tað kemur til upplýsingarskyldu til Hagstovu Føroya og lógarkravið um burðardyggagjaldið.

Vinaliga
FERÐAVINNUFELAGIÐ
Bára Gunnarsdóttir

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo